

## Ljóst violettar blómur í ár

Rósan er brúðarblóman burturav. Saman við hvítum ynskja tey flestu sær ljóst violett í ár. Annars eru føroyingar rættiliga siðbundnir og velja sær ofta reyðar rósur til brúðarbukettina.
Kelda: Árstíðirnar



Ein stórur dagur í lívinum hjá einari smágentu – at vera brúðargenta

# Tað er gaman at vera saman..

**Saman við jólunum er ólavsøkan stóra brúdleypshátíðin. Komandi tveir leygardagarnar verða í minsta lagi 14 brúdleyp kring landið, har eini 2500 gestir fara at hátíðarhalda, at tvey, sum eru góð, hava valt at játta kærleikan sínamillum fyri Gudi og fólki**

Sosialurin tosaði við brúðarpørini, sum, hóast tey øll hava úr at gera til stóra dagin, vóru sera spent, opin og fitt at tosa við.

Felags fyri næstan øll var, at brúdleypið verður hildið nú um ólavsøkuna, tí tá koma útisetarnir heim - einamest úr Danmark. Fleiri høvdu eisini jubileum um høgtíðina, tí tey komu saman júst á ólavsøku.

Eitt annað, sum var felags fyri øll var felagssangurin. Øll brúðarpørini høvdu fyrireikað sangir til gestirnar, og er hetta helst eitt serkenni her á landi. Hetta er sostatt ein siður, sum fólk vilja varðveita – helst tí teimum líkar hann.

Eisini tosaðu vit eitt sindur um, hvat tað týdningarmesta er, fyri at fáa eitt gott hjúnalag. Har vóru tey flestu samd um, at erligheit, opið samskifti og virðing fyri hvørjum øðrum hava alt at siga.

Amorinurnar verða í øllum førum luftaðar um høgtíðina; vónandi bæði hjá teimum, sum hava funnið sær ein at fylgjast við á lívsleiðini, og hjá teimum, sum ikki hava funnið sær ein vin fyri lívið enn. Á ólavsøku átti úrvalið at verið bæði fjølbroytt og rúgvismikið, so um viljin er til staðar, átti tað var borið til at funnið sær ein maka – um ikki fyri lívið, so fyri nakrar tímar – ella kanska er rættari at leita í einum av mongu brúdleypunum.

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*





## Níggju brúðargentur

26. juli giftast 35 ára gamli Ian Skylv Hansen og Óluvá Poulsen, sum er 32 ár, nú tey hava gingið saman í 11 ár. Tey bæði búgva í Havn, og tí verður vígslan í Vesturkirkjuni. Ian fer í føroysk klæði og Óluvá hevur keypt sær ein hvítan brúðarkjóla niðri, og so hava tey lænt bobluna hjá Sofusi at koyra við. Eitt serligt við brúdleypinum hjá teimum báðum er, at har verða heili níggju smáar brúðargentur, ið allar verða í fínum kjólum, sum Sanna Rasmussen hevur seymað teimum.

Ian og Óluvá eiga tvey børn, eina dóttir, sum er fýra ár og ein eitt ára gamlan son.

Veitsla fyri 250 gestum verður í HB húsinum, har Anskar úr Dali kokkast við trimum ræittum. Afturvið verður vín og sodavatn og seinni eisini barr. Undir borðhaldinum undirhalda Finnbogi og Bjarni Lisberg, meðan Spaðar Fimm spæla til dansin aftaná. Tá brúðarparið ikki orkar meira, stendur svitan á Hotel Føroyum klár til teirra.

*Blómur: Gladiolus og sólblómur*
*Litir: Turkis og hvítt*

## Møttust á Ólavsøkukonsertini 1998

**28 ára gamla Kjarta Johannesen og 30 ára gamli Erland E. Jacobsen, sum búgva á Argjum, eru eitt ordiligt ólavsøkupar. Tað eru nevniliga akkurát 10 ár liðin, síðan tey funnu hvønn annan á Ólavsøkukonsertini í 1998. Um hetta mundið í fjør fór Erland niður á knæ og bað um hond Kjartu, sum er ættað úr Dali. Nú, eitt ár seinni, leygardagin 26. juli, geva tey bæði hvørjum øðrum jaorð í Dals kirkju. Aftan á verður skotið fyri teimum sum siður er í Dali. Aftaná verður veitsla fyri umleið 180 fólkum í bygdarhúsinum Eiriksgarði, har Elisabeth Myllhamar borðreiðir við trimum ræittum, øli, víni og sodavatn. Kjarta fer í hvítan brúðarkjóla frá Brúðarlín, og Erland í myrkan klædning frá Kallkyn. Smáu børnini, drongur og genta, vera í fínum brúðarklæðum. Til dansin hava tey biðið suðuroyingarnar Eyðun og Niel undirhalda.**



*Blómur: Rósur*
*Litir: Violett og hvítt*



*Blómur: Rósur*
*Litir: Hvítt, reytt og gull*